# Minningarorð



Týsdagin 20. mai andaðist Tórbjørn Mikkelsen, 71 ára gamal.

Tórbjørn var sjúkur, men tað vardi okkum ikki, at hann skuldi fara so knappliga.

Tórbjørn var valdur í umboðsráðið hjá Havnar Sjúkrakassa í 1971, í nevndina í 1979, formaður í 1990 og formaður var hann, til hann segði seg frá í 1998, men helt fram sum nevndarlimur. Tórbjørn hevur verið formaður í Meginfelag Sjúkrakassa Føroya síðan 1986 til hann andaðist.

Vit minnast Tórbjørn fyri hansara ídni, og hann var sjáldsama nærlagdur í starvinum, sum ein ikki sær ofta; hann møtti altíð væl fyrireikaður og til tíðina, tá ið fundir vóru.

Hann tók lut í so mongum góðum verki. Var m.a. virkin í avhaldsrørsluni og innan ítróttin. Sjúkrakassarørslan var eitt av hansara hjartamálum.

Øll hesi mongu ár hevur hann verið virkin sum samskipari í tí týðandi tátti sjúkrakassarnir hava í samfelagnum við samráðingum um lønarmál og sáttmálar við læknar, serlæknar, fysioterapeutar og aðrar bólkar, sum veita heilsutænastur til okkara borgarar.

Tórbjørn var samráðingarleiðarin burturav, tað fall honum lætt at stýra fundum, finna semjur og loysnir og tá ið tørvur var á tí, kundi hann gera neyðugar niðurstøður.

Vit hava mist ein góðan vin og starvsfelaga, tað er undarligt hjá okkum at venja okkum við tankan, men veruleikin kemur spakuliga til okkum – Tórbjørn er ikki meira millum okkum – vit fara at sakna hann og vilja vísa okkara djúpu samkenslu í stóru sorg tykkara, sum hava mist ein góðan mann, pápa, verfaðir og abba.

**Sjúkrakassarnir**

# Frelsunarherurin til Noregs




Mánadagin fór eitt ferðalag við 50 fólkum úr Ferlsunarherinum í Føroyum til Norra við Norrønu. Tey skulu koyra úr Bergen til Lillestrøm, har tey skulu búgva.

Endamálið er at vera við til árskongressina hjá Frelsunarherinum í Oslo, har eini 2-3000 fólk koma saman. Kongressin frá 27. til og við 29. juni. Føroyingarnir skulu syngja og vitna á fleiri møtum. Aftaná kongressina skulu tey syngja í ymiskum samkomum í Oslo.

Fýra soldátar úr Frelsunarherinum í Vági verða lidnir á offisersskúlanum í Asker, nærhendis Oslo, hósdagin 26. juni, tey eru: Mirjam og Magnus Jensen og Jacobina og Finnbogi Olsen.

Ferðaleiðarar á túrinum eru Elisabeth og Sámal Jákup Joensen. Síðsta møtið verður í Bergen, og ferðalagið kemur heim aftur við Norrønu mikudagin 9. juli.

**Dagurin**
**25. juni. Prosper**. Halgimenni úr Fraklandi, sum teir annars vita lítið um at siga uttan tað, at hann var høgt mettur kirkjulærari í fornkirkjuni og doyði í 455. Navnið merkir hin eydnuríki.

## Andlát og jarðarferðir

**Sigbjørg Jacobsen**, ættað úr Nólsoy, búsitandi í Havn andaðist sunnudagin, 73 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin klokkan 13.

**Anna Elisabeth Holm**, fødd Veihe, vanliga nevnd Lisa, ættað úr Þorkeri, búsitandi í Helsingør andaðist á Helsingør Sjúkrahúsi fríggjadagin 20. juni, 92 ára gomul. Jarðarferðin verður frá Helsingør kapell hósdagin klokkan 11.

**Ann Danielsen** av Argjum andaðist í Keypmannahavn 20. juni, 43 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Hanna Davidsen**
fødd Olsen
ættað úr Leirvík
búsitandi í Lysekil

andaðist mánadagin 23. juni, 82 ára gomul.

**Systkin við familju**

Kæra mamma, omma og vermóðir okkara

**Sigbjørg Jacobsen**
fødd í Nólsoy,
búsitandi í Tórshavn

andaðist sunnudagin 22. juni, 73 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum
mikudagin kl 16.00.
Jarðarferðin verður úr Dómkirkjuni
hósdagin 26. juni, kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Janet og Eydna**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu okkum samkenslu og mintust mammu okkara

**Janu Jensen**

Vit takka fyri umsorgan og hjálpandi hendur.
Vit takka øllum, sum hava verið um hana á Lágargarði hesi árini, hon hevur búð í Heimarustovu, og sum handaliga og andaliga stuðlaðu henni í ellini.
Vit takka presti og øllum hinum, sum hjálptu okkum við jarðarferðini, og øllum sum fylgdu.

**Helena, Ruth og Jens Petur**